Barsilsgrunnurin útsettur

– Uppskotið er ikki væl greitt úr hondum av Vinnumálastýrinum, tí verða nógvar broytingar og tær flestu koma frá landsstýrismanninum sjálvum, sigur Heini O. Heinesen, formaður í vinnunevndini

BARSILSLØN
Turið Kjølbro

Viðgerðin av uppskotinum um nýggja barsilsskipan er um at verða liðug í vinnunevndini, ávegis álit er skrivað og á næsta fundi í nevndini, sum verður hósdagin í komandi viku, verður uppskotið sent í løgtingið. Greitt er longu, at skipanin ikki fær gildi frá 1. apríl sum ætlað, men frá 1. juni, og greitt er eisini, at broytingarnar í uppskotinum verða nógvar. Flestu broytingarnar koma frá landsstýrismanninum í arbeiðsmarknaðarmálum, Bjarna Djurholm, sum sjálvur hevur lagt uppskotið fram.

– Uppskotið er ikki væl greitt úr hondum av Vinnumálastýrinum. Nógvar størri og smærri broytingar eru gjørdar. At dagfestingin, tá ið skipanin skal koma í gildi, er flutt, er ikki av okkara ávum, men eftir ynski frá landsstýrismanninum í vinnumálum. Nøkur viðurskifti verða ikki klár fyrr enn tá, sigur Heini O. Heinesen, formaður í vinnunevndini.

Ein av broytingunum í álitinum verður í grein 11, sum sigur, at rætturin til barsilspening er treytaður av, at móttakarin í minst seks mánaðir innan teir síðstu 12 mánaðirnar áðrenn fráverutíðarskeiðið hevur havt so mikið av arbeiði, at inntøkan í hesum tíðarskeiði hevur verið 10 prosent av lønini sambært sáttmála millum Føroya Arbeiðsgevara og Føroya Arbeiðarafelag.

– Vinnunevndin mælir til, at hendan greinin fellur burtur, tí hon gevur onga meining, sigur Heini O. Heinesen.

Nýggja barsilsskipanin kemur eftir øllum at dømi í gildi 1. juni í ár

Myndin er tilvildarliga vald

Undir fyrstu viðgerð av uppskotinum á tingi, høvdu nógv tingfólk á orði, at heimaarbeiðandi kvinnur eisini eiga at verða fataðar av lógini.

– Hesar kunnu tekna sær eina trygging á sama hátt sum tær hava kunnað gjørt tað sambært dagpeningalógini. Tær fáa tískil í mun til tað tær gjalda. Hendan møguleikan hava heimaarbeiðandi kvinnur eisini í dag, men sum eg havi skilt verður hann ikki nógv brúktur, sigur Heini O. Heinesen.

Tað verður ein samd nevnd, sum skrivar undir álitið um nýggja barsilsskipan. Nevndin hevur viðgjørt uppskotið í slakar tveir mánaðir, og nógv fólk hava verið innkallað.

Nú uppskotið er á gáttini og tá ið hugsað verður um, hvussu leingi hevur verið bíðað eftir einum barnsburðargrunni galdandi fyri allar kvinnur á arbeiðsmarknaðinum, er bara at vóna, at eitt nýval ikki forpurrar alt. Tí verður nýval, fellur uppskotið burtur....

Avène tilbúningarnir innihalda vatn úr keldu, sum liggur í lítla býnum Avène í suður Fraklandi. AVÈNE tilbúningarnir finnast til alla húð: Vanliga húð, turra og vætufátæka húð, unga, trupla húð, til ovurviðkvæma og viðkvæma húð, umframt til eygu, varrar og kropp. Kelduvatnið inniheldur rættiliga nógv kisel og smáverulívfrøðilig evni.

Lise-Lotte, serfrøðingur frá Pierre Fabre, verður at hitta á apotekinum í Tórshavn mánadagin 12. mars og týsdagin 13. mars og í Apoteksútsøluni í Runavík mikudagin 14. mars og hósdagin 15. mars.

Tjaldurs Apotek - R. C. Effersøesgøta 31 - 100 Tórshavn - Tlf. 341100

Aldanna børn

BÓKAÚTGÁVA
Eirikur Lindenskov

»Aldanna Børn« er seinasta bókin í trilogi hjá Ólavi í Beiti. Høvnundurin hevur sjálvur málað premumyndina

Forlagið Grønhólmur í Sørvági gav í gjár út bókina Aldanna Børn eftir Ólav í Beiti, rithøvund.

Bókin er partvís eitt greinasavn, har høvundurin endurprentar ymsar viðmerkingar, hann hevur havt í blaðunum, Sosialinum og Dimmalætting.

Men hví heitið »Aldanna børn«?

– Eg havi livað í tveimum øldum, og tí havi eg valt felirtalsformin, Aldanna børn, sigur Ólavur í Beiti. Hann heldur sjálvur, at tað er ringt at seta bókina í ávísan bólk.

– Talan er hvørki um skaldsøgu, stuttsøgusavn ella um yrkingasavn. Men vit kunnu siga, at hetta er seianasta bókin í eini trilog, har eg viðgeri sama evni, sigur hann.

Ólavur í Beiti gav í 1998 út bókina »Til kærleikin meg skilir«, í 1999 bókina »Sangur einliga pápans«. Hendan bókin, Aldanna børn, er endin, har høvundurin m. a. vísir, hvussu onkrir av trupulleikinum, sum viðgjørdir vóru í hinum bókunum, vórðu loystir.

– Eg havi m. a. viðgjørt trupulleikan hjá einligum pápum, hvussu skerd rættindi teir hava, og at lógarverkið, sum beinleiðis kúgar pápan, er frá 20'unum. Í hesi bókini kann eg fortelja fólki, at eg nú eri pápi á pappírinum eisini, sigur høvundurin.

Ólavur í Beiti er føddur í 1952. Umframt at hava skrivað fleiri bøkur, hevur hann eisini starvast sum blaðmaður í mong ár.

Av verkum hansara kunnu nevnast søgusøvnini »Einaferð«, »røkun Snarljós og hennara dýrabæra ogn« og »Losi tann Fyrsti« og skaldsøgurnar »Eitt slag av tíð« og »Táið tú kemur«, sum eisini er komin út á donskum.



Bókin, Aldanna Børn, er prentað á Dimmalætting, og Helge Justinussen hevur heft. Mentanargrunnur Landsins og Fjølrit hava stuðlað útgávuni.

Bókin er góðar 150 blaðsíður og kostar 180 krónur í bókabúðunum.

Oddfríður formaður

MENTAN
Birgir Kruse

Oddfríður Marni Rasmussen verður formaður í nýggju starvsnevndini í Listafólkasambandi Føroya, LISA. Hinir nevndarlimirnir eru Jenny Petersen og Jens Frederiksen. Nýggjur skrivari í sambandinum er Súsanna Holm

Hósdagin legði gamla nevndin í LISA frá sær og hin nýggja tók við. Eisini nýggi skrivarin varð kunngjørdur. Tað er 43 ára gamla Súsanna Holm, sum er útbúgvin pedagogur, men í løtuni lesur hugmyndasøgu. Hon avloysir Maluna Johannesen.

Hóast lesturin er knýttur at lærda háskúlanum í Árhus, býr Súsanna í Kvívík og ferðast ímillum. Bæði Havnina, har nýggja uppgávan hjá Listafólkasambandinum verður røkt í Djónastovu yviri við Strond, og so Árhus, har hugmyndasøguligi lesnaðurin gongur á fjórða árið.

Jórun takkar fyri seg

Jórun í Dali, sum hevur verið virkin í LISA síðani sambandið bleiv til fyri 19 árum síðani, takkaði á tíðindafundi hósdagin fyri seg og ynskt nýggju nevndini og nýggja skrivaranum góðan byr. Afturat at henni sótu Brandur Øssursson og Sharon Weiss í fráfarnu nevndini, meðan Malan Johannessen var skrivari.

Sum fráfarandi formaður vildi Jórum vísa á, at nýggja nevdin kemur til nýggja skrivstovu, nýggjan skrivara og nýggja heimasíðu. «Stóra uppgávan er, at gera sambandið sjónligt«, sigur Jórun. «Farna skeiði hava vit brúkt mestu tíðina uppá Listafólkastevnuna, sum skal verða í august og so at arbeiða við upphavsrættindum og skattligum viðurksiftum hjá listafólki. Eisini hava vit í ein ávísan mun verið við í arbeiðnum kring sonevndu Bryggjuna í Keypmannahavn«, segði Jórun í Dali fráfarandi formaður, sum ynskt, at nýggja nevndin varð væl móttikin og at hon somuleiðis fær eina góða byrjan.

Nýggi formaðurin

Eftir hesi orð kunngjørdi Jórun nýggja formannin. Ikki óvæntað gjørdist tað Oddfríður Marni Rasmussen, rithøvundur. Hann er 32 ára gamal og ættaður heiman av Sandi. Hinir nevndarlimirnir eru Jenny Petersen, sum er 39 ára gomul og ættað úr Havn og Jens Frederiksen, sum er 45 ára gamal og ættaður úr Danmark.

Nývalda nevndin umboðar Rithøvundafelag Føroya, Leikarafelag Føroya og Felagið føroysk Myndlistafólk. Tilsamans nýggju felløg eru limir í LISA. Tey nýggju limafeløgini fevna um eini 2000 listafólk.

Fyrsta uppgávan, sum nývalda starvsnevndin fær, er at gera av hvussu leingi tey skulu sita. Við tað, at øll nevndin er nývald, skulu tey eftir reglugerðini semjast um, hvør skal sita í eitt ár og tvey ár. Bert ein av teimum trimum nevndarlimunum hevur rætt at sita í tvey ár, meðan hinir báðir nevndarlimirnar skulu sita í eitt ár. Hvør verður hvør, verður upp til nevndina at avgera.

Men sínamillum eru tey trý nývaldu vorðin samd um, at Oddfríður verður formaðurin. «Vit hava eitt megnar arbeiði fyri framman« segði formaðurin eftir at hava takka fyri álitið.

Hvør er mentunarliga støðan?

Hann undirstrikaði, at nývalda nevndin, saman við fráfarnu nevndin, fer at seta seg inn í øll viðurskifti hjá Listafólkasambandinum og miðvíst arbeiða víðari við upphavsrættindum og skatta- og eftirlønarvirðurskiftum hjá listafólki. »Eisini fara vit at hyggja í mentunarálitið hjá landsstýrismanninum frá 1996 og staðfesta, hvør støðan er. Gera status, soleiðis mentunarliga og kann eftir, hvussu og um mentanin man hava flutt seg hesi árini« segði Oddfríður um ætlaða virksemið hjá nývaldu nevndini.

Nývaldi formaðurin nevndi eisini ætlanir um eina mentunarliga heimasíðu eftir írskum mynstri og harafturat ætlar nýggja nevndin at skipa fyri almennum tiltøkum, har listagreinir kunnu samantvinnast í størri mun enn higartil. «Eitt nú sum Myndlistafelagið ger í Listaskálanum í hesum døgum, at samantvinna teirra list við tónlistina, har Aldubáran spælir nýggjan føroyskan tónleik afturvið Várframsýningini á hvørjum ári« siga tey trý sum við ein munn - Oddfríður, Jenny og Jens. Jú, nevndin tykist virkisfús og tørvar ikki hugskot.

Frá náði til starvsløn

Spurd um korini hjá føroyskum listafólki eru batnaði hetta skjótt tjúgu ára skeiði LISA hevur verið til, svarar fráfarandi formaðurin Jórun í Dali, at tað er hon ikki í iva um «Men vit gera tað ikki einsamøll. Men í samstarvi. Eitt nú við nevndarsessum, har sjónarmið okkara stútt og støðugt verða hildin fram, til dømis í Mentunargrunni Landsins, sum nú kann lata listafólk fáa trý ára starvsløn« sigur Jórun og skoytir uppí «Fyrr kundu listafólk av náði fá tríggjar mánaðir at gera eitt verk liðugt. Í dag kunnu tey fáa trý ár – bara til at arbeiða í. Tað er eitt risa framstig og ein avgerandi hugbursbroyting« sigur Jórun, sum tó eins og fráfarni skrivarin, leggur afturat, at einki verður gjørt av Listafólkasambandinum einsamøllum. Alt krevst verða gjørt í felag. Men onkur má halda loganum brennandi, siga tær báðar, Malan og Jórun. «Tað er stóra uppgávan hjá LISA,ið sum ongan ting kundi farið fyri bakka, herfyri, høvdu vit ikki havt bara nakrar eldsálir« leggja tær afturat.

Sosialurin ynskir nývaldu starvsnevndini í Listafólkasambandi Føroya tillukku og góða eydnu framyvir, so vit sum frá líður, kanska fáa ein orðaðan mentanarpolitikk, so sum tiltikna samgonguskjalið leingi hevur sagt. Hvør veit.

Nývalda starvsnevndin í Listasambandi Føroya er frá vinstru Jens Frederiksen 45 ár og umboðandi Felagið føroysk Myndlistafólk, Oddfríður Marni Rasmussen, 32 ár og umboðandi Rithøvundafelag Føroya og Jenny Petersen 39 ár, umboðandi Leikarafelag Føroya. Longst til høgru er nýggju skrivarin Súsanna Holm, sum er 43 ár og lesur hugmyndasøgu

Mynd: Jens K. Vang

Fráfarna og nývalda starvsnevndin í LISA: Nývald eru Oddfríður Marni Rasmussen, Jenny Petersen og Jens Frederiksen. Fráfarna nevndin er Jórun í Dali, Brandur Øssursson og Sharon Weiss, sum ikki er við á myndini. Fráfarni skrivarin er Malan Johannessen og í hennara stað kemur Súsanna Holm

Mynd: Jens K. Vang

Heimurin broytist hvønn tann einasta dag. Tí mást tú gera teg til reiðar at fylgja við.
Handilsskúlin hevur alla ta nýggjastu kunningartøknina og brynjar teg til framtíðina. Uttan mun til um tú eftir Handilsskúlan velur eina hægri útbúgving sum t.d. løgfrøði ella búskaparfrøði ella fert beinleiðis út í vinnulívið. Uttan mun til um tú velur FHS ella Hægri

Hví taka annað, tá tú kanst fáa bæði?

FØROYA HANDILSSKÚLI
Marknaðslivegur 77, Postsmoga 177, 110 Tórshavn, Tel 31 71 77
Kambsdalur, 530 Fuglafjørður, Tel 44 49 00